# Føroyingar skulu kenna seg tryggar

**TRYGGLEIKI** – Krøvini til trygdina í Europa eru nógv harðari enn í USA. Tí haldi eg eisini, at føroyingar skulu kenna seg tryggar, tá borað verður sigur Dongstjóri.




*Løgmaður hittir tríggjar av stjórunum í DONG, Søren Gath Hansen, Jan Terje Edvardsen og Søren Andersen*

Jan Müller

Nú leiðslan í DONG vitjaði í Føroyum herfyri nýttu vit høvið til at spyrja, hvørjar avleiðingar DONG leiðslan heldur dálkivanlukkan í Meksikoflógvanum kann fáa fyri framtíðar leiting og virksemi á djúpum vatni millum Føroyar og Hetland?

Søren Gath Hansen: – Tað, sum er hent og sum ikki átti at verið hent í Meksikanska flógvanum er djúpt tragiskt. Vit vita tó ikki nágreiniliga, hvat er hent, men tað vit vita, og tá er tað líkamikið, um tú borar á djúpum ella á grunnum vatni, er, at tá tú borar niður í goymslur í undirgrundini er har eitt sera høgt trýst. Tí finnast arbeiðshættir og útgerð til at taka sær av hesum, men tað er eisini munur á, hvussu tú designar brunnar og virksemi í Meksikanska flógvanum og so í okkara parti av heiminum. Krøvini til trygdina eru nógv strangari í Europa, og eg vildi hildið, uttan at vita júst, hvat er hent í USA, at man fer at innsíggja, at slík óhapp kunnu ikki henda her, tí krøvini, sum sett verða, eru so nógv øðrvísi. Dong stjórin sigur, at teir eftir vanllukkuna í USA hava gjøgnumgingið allar trygdarrutinur, har felagið arbeiðir.

Og hann heldur fram: – BP eins og nógv onnur stór oljufeløg royna so at gera tingini skjótari og bíligari við eitt nú at finna nýggjar mátar at gera tingini uppá, og tað ger so eisini, at man alla tíðina roynir at flyta mørkini fyri, hvat er møguligt. Tað er greitt, at vit hava sera nógv fokus uppá, at slíkt má ikki henda. Eg rokni eisini við, at myndugleikar um allan heim nú sita og royna finna út av, um krøvini til boring eru nóg strong, og um tey verða fylgd.

## Føroyingar ikki kenna seg ótryggar

– So føroyingar skulu ikki kenna seg ótryggar í sambandi við framtíðar boringar her?

– Nei tað skulu teir ikki, og tað hava teir heldur ikki havt orsøk til higartil. Slíkar vanlukkur eru heldur ongantíð hendar í okkara parti av heiminum, og eg havi álit á, at tær fara heldur ikki at henda her, soleiðis sum okkara trygdarskipanir og design eru.

– Men BP er eitt ómetaliga stórt oljufelag við bæði pengum og royndum, so man skuldi trúð, at teir lógu frammarlaga, tá tað galt trygdini.

– Tað rokni eg eisini við, at teir hildu undan vanlukkuni og nú mugu so kanningar vísa, hvat er hent, og tað fer so at fáa felagið til at endurskoða síni design av hesum slagnum av brunnum. Og amerikanskir myndugleikar fara eisini at enduskoða krøvini og reglarnar. Hinvegin hevur BP arbeitt innan fyri teir lógarkarmar, sum verða ásettir av myndugleikunum, og eg kann bara endurtaka, at hesi krøvini eru minni í USA enn í Norðsjónum og í Atlantshavinum. Og føroyska skipanin, veit eg frá okkara fyrstu boringum her, svarar til tey strongu krøvini, sum verða sett í Noregi. So eg haldi gott man kann siga við føroyingar, at teir kunnu kenna seg tryggar.

– Nú er tað so, at tað er BP, sum er operatørur á teimum stóru framleiðandi feltunum í bretskum øki nær føroyska markið. Hetta ger teg ikki ótryggan heldur?

– Tað ger tað ikki m.a. tí, at alt regulverkið her er øðrvísi enn tað í USA. Tað er so ein trygd sum myndugleikarnir hava skapt fyri okkum.

## Grønland

– Dong er eisini við í leitivirksmeinum við Grønland, har eitt nú kanadiskir myndugleikar hava heitt á grønlendska landsstýrið um at útseta boringar. Hvat sigur Dong til hetta:

– Tað mugu vera grønlendsku myndugleikarnarnir, sum taka støðu til tað. Vit kunnu vísa myndugleikunum, hvat tað er fyri karmar vit arbeiða undir, og so kunnu myndugleikarnir taka støðu til tað út frá tí. Tað er eisini ein spurningur um javnvág. Hetta er jú eitt tilfeingi, sum grønlendingar eisini og føroyingar hava sagt seg vilja troyta, soleiðis at tað kann vera eitt íkast til búskapirnar í londunum og partur av grundarlagnum fyri størri sjálvstýri. Men tað skal sjálvandi ikki henda uppá bekostning av trygdini.

---

# DONG um ENI boring: – Tað sær gott út

**SJEYNDI BRUNNURIN** Hetta er eitt gott og spennandi prospekt, stóri spurningurin er, hvussu stórt eitt fund, verður tað gjørt, er heldur stjóri í danska felagnum.

Jan Müller

ENI skal bora við Føroyar í næstum. Nú er Dong ikki partur av tí boringini, men hvussu heldur Dong-leiðslan møguleikarnar vera fyri at finna olju í tí brunninum?

Jan Terje Edvardsen: – Vit halda, at hetta er eitt gott og spennandi prospekt, og vit ynskja teimum góða eydnu. Spurningurin er bara, hvussu stórt eitt fund man vera har. Hetta liggur í einum umráði tætt upp at økjum hinumegin markið, har fund eru gjørd, so vit síggja rættiliga ljóst uppá hesa boringina. Vit vóna, at ENI ger eitt fund, tí tað fer at økja um áhugan fyri øllum økinum og ikki minst geva týðandi upplýsingar um føroysku undirgrundina.

– Anne Marie leiðin, har borað verður í næstum, liggur ikki so langt frá Cambofundinum, sum Dong eisini er partur av á bretsku síðuni. Tað hevur ljóðað, at Cambofundið gongur inn um føroyskt mark.

– Cambo gongur ikki inn á føroyskt øki, hóast oljukeldan gongur tætt inn móti markinum. Vit hava borað tríggjar brunnar á Cambo og tí vita vit, hvar strukturin gongur. Og eg má siga tíverri, hann gongur ikki inn um føroyskt mark.

– Nær er sannlíkt, at avgerð verður tikin um at útbyggja Cambo?

– Vit meta framvegis, um tað skulu borast fleiri avmarkingarbrunnar men vóna at fáa eina framleiðslu innan rímuliga tíð.

Umframt Cambo er eisini gjørt eitt annað fund gjørt longur norðari, nevnt Rosebank. Jan Terji Edvardsen sigur, at spurningurin um at kunna samskipa eina útbygging av báðum hesum keldum eisini verður vendur.

## Samskipa útbygging um markið

– Og verður olja funnin nú á Anne Marie leiðini og á eini aðrari leið á føroyskum øki beint vestan fyri Rosebank eisini, vil tað so eftir tykkara tykki eisini vera ein møguleiki fyri at samskipa eina útbygging føroysku megin við útbyggingar hinumegin markið?

– Avgjørt. Dømi er um júst tað sama í donskum og norskum øki, har fund er gjørt í norska partinum, og sum ikki lønar seg at útbyggja einsamalt men sum nú verður knýtt uppí framleiðslu donsku megin umvegis rørleiðingar. Tað vísir so, at hetta ber til at gera tvørtur um markið millum tvey lond. Hetta er fyrsta av sínum slag millum Noreg og Danmark. Nú skal eg ikki gera meg klókan uppá støddina av møguligum fundi á Anne Marie men skuldi tað verið eitt lítið felt, so vildi tað verið møguleiki at bundið tað upp infarstrukturin bretsku megin.

Søren Andersen, sum stendur á odda fyri útviklinginum við Hetland, vísir á avgerðina at útbyggja gassfelt í hetlendskum øki, sum so kunnu fáa týdning fyri fund á føroyska landgrunninum eisini.

– Fyrst byrjar tú við frontierkanningum, har eingin veit nakað. Síðani verða fund gjørd, men man veit ikki, hvat man skal gera við tey, tí eingin infrastrukturur er. Men tá gjørd eru fleiri smærri fund, sum kunnu bera kostnaðin av einum infrastrukturi, so kemur hitt av sær sjálvum, at tú kanst knýta nýggj fund uppí uttan at hugsa um at tú skal fara undir eina útbygging einsamalt. Tí haldi eg eisini, at tað er heilt rímuligt at taka fram Cambo og Rosebank útbyggingarnar í bretskum øki, tí verða tær gjørdar kunnu tær gera, at vit kunnu fáa framleiðslu í gongd við Føroyar nógv skjótari.

jan@sosialurin.fo